# Russar heiðra Árna Dam



*Árni Dam saman við fiskarí attachéinum Yury Piskarev, og dóttur Árna, Mathildu og konuni Marionnu.*

*Mynd: Buynevich Sergey*

**Týsdagin fekk Árni Dam handa serligt heiðursmerkið fyri stóra arbeiðið fyri at menna samstarvið millum Føroyar og Russland. Sosialurin hevði ein mann við handan tær annars sera afturlatnu dyrnar á russisku sendistovuni í Keypmannahavn**



NØVN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í sambandi við russiski tjóðardagin var, sum vant stór móttøka á Russisku sendistovuni í Keypmannahavn. Men í ár var ein minni móttøka hildin frammanundan. Íðnaðar- og orkustýrið í Ruslandi hevði tikið stig til at handa serlig heiðursmerki til fólk, ið framum onnur høvdu havt týdning fyri samstarvið á íðnaðarøkinum millum Russland og Danmark. Millum tey, ið fingu hetta heiðursmerkið var russiski heiðurskonsulin í Føroyum Árni Dam. Fjølmiðlar vóru ikki bodnir við, men av tí, at yvirritaði er sonur Árna, gjørdi russiska sendistovan eitt undantak, og sostatt fekk Sosialurin, sum einasti miðil í heiminum atgongd til bæði handanina, og til fundin, ið var hildin áðrenn handanina.

### Fyrsta av sínum slag

Tað er serliga skipanarkommitein fyri Rusland – Danmark Altjóða Fíggjarforum, sum í samstarvi við russisku ambassaduna hevur avgjørt, hvør hevði uppiborið henda serliga heiður. Hetta er fyrstu ferð, at Russland letur eitt tílíkt heiðursmerki, og hetta er heldur ikki gjørt í øðrum londum.

Árni Dam fekk heiðurin fyri stóra arbeiði við russiskum skipum, ið hava vitjað Føroyar, men eisini fyri sítt virkið sum russiskur heiðurskonsul, har hann eisini hevur verið við til at skapt samband millum føroyskur og russiskar myndugleikar, við atliti til samstarv landanna millum.

### Stjórar og prinsar

Umframt Árna Dam fingu stjórin í Danfoss, stjórin í Carlsberg, stjórin í Dansk Industri, formaðurin fyri Danskt/russiskt felag og Prins Dimitri Romanov av Tsar ættini serliga heiðursmerkið.

Handanin var sera formel, og tað var russiski ambassadørurin í Danmark Dmitriy Ryurikov, ið handaði heiðursmerkið til ein sjónliga rørdan Árna Dam. Eisini var Ídnaðar- og orkustýrið í Russlandi umboðað. Hetta stýrið er sambært ambassadørinum týdningarmiklasta stýrið í Russlandi.

### Óheft og áhugaverd

Áðrenn sjálva handanina var Árni við familju boðin til kaffi saman við ambassadørinum, fiskarí attachéinum Yury Piskarev og russiska konsulinum í Danmark Sergey Popkov. Hesin fundur var á pappírinum ein óformellur kaffifundur, men ein óformellur kaffifundur við tríggjar somikið týdningarmiklar menn er ongantíð heilt óformellur, og bæði ambassadørurin og fiskarí attachéin nýttu høvið, at vísa á, at Føroyar er eitt sera áhugavert land, tá tað snýr seg um samstarv. Við, at Føroyar ikki eru partur av ES, eru møguleikarnir fyri samstarvi og ikki bert á fiskivinnuøkinum, sera stórir. Ambassadørurin, boðaði frá, at hann eftir at hava verið í Føroyum her fyri, í sambandi við stóru sendiharravitjanina, hevði hann sent áheitan til Moskva um, at fáa í lag størri samstarv við Føroyar. Sendiharrin sendi heilsu til løgmann, og segði seg vóna, at samstarvið landanna millum kundi gerast uppaftur størri. Árni hevði somuleiðis heilsu við frá løgmanni.

Fiskarí attachéin segði, at hann metti avtalurnar millum Føroyar og Russland vera sera góðar fyri báðar partar, og vónaði at eins gott samstarv kundi koma í lag á øðrum økjum.

### Takka fyri jólagávur

Áðrenn kaffifundurin endaði, tók fiskarí attachéurin eitt klipp úr Sosialinum fram,. Hetta var grein um føroysku jólapakkarnar, ið russiskir sjómenn fáa frá føroyingum. Hann sendi eina stóra tøkk til allar teir nógvu føroyingarnar, ið á hvørjum ári vísa sín næstrakærleika og gestablídni á hendan hátt.

Eftir handanina var innboðin móttøka í ambassaduni í sambandi við at russiskur tjóðardagur var. Hetta var ein stak hugnalig løta við nógvum gestum og góðum mati.

# Rørsla er heilsubót og sálarbót



*Boccia er eitt ógvuliga væl umtókt spæl, sum øll kunnu taka lut í*

**Út við eitthundrað sinnisveik savnaðust í morgun við vøllin á Argjum, har tey fara at íðka ítrótt í allan dag. Tað var sjálvur landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ið setti dagin**

HEILSA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tey vóru ógvuliga spent, tey flestu, nú tað fyri fyrstu ferð verður skipað fyri ítróttadegi fyri sinnisveik.

- Onkur møtti longu klokkan seks í morgun fyri at rigga til til dagin. So vit kunnu ikki siga annað, enn at tey eru spent til hetta tiltakið, segði Mary í Garði, stjóri fyri Nærverkinum, sum stendur fyri degnum.

Hugskotið kom annars frá Stuðulstænastuni, sum hevur økið sinnisveik undir sær, og hetta mentist í samráð við brúkararnar sjálvar. Dagurin er skipaður sum ein felags dagur fyri alt landið, og fólk eru eisini komin úr øllum heraðshornum út á Argir, har graslíkisvøllurin hjá AB er karmur um tiltakið.

Dagurin byrjaði við morgunmati til allar luttakararnar og starvsfólk klokkan níggju, og tá so øll vóru mett og væl sett, setti landsstýrismaðurin fyri heilsumál, Hans Pauli Strøm, stevnuna.

Hans Pauli gongur sum kunnugt ógvuliga høgt upp í heilsuna hjá fólki, og letur ongan møguleika fara aftur við borðinum, har hann kann seta fokus á júst hetta. Hann nevndi eisini Fólkaheilsuætlanina og tey fýra átøkini í hesum sambandi, tað er rættur kostur, tað er ávaring móti tubbakki, ávaring móti rúsevnismisnýtslu og so síðst, men ikki minst, likamsvirkni.

- Vit kunnu róliga siga, at tað, at verða virkin, at svimja, at spæla bólt, at ganga nógv ella renna – tað er bæði heilsubót og sálarbót fram um alt annað, segði Hans Pauli Strøm.

Hann fegnaðist um tiltakið og nevndi, hvussu nógv hugaligari alt er, tá tað eru fleiri saman um tað, tey gera.

- Kroppurin er jú skaptur til aktivitet. Hvat eru beinini til? At koyra bil við? At liggja á sofuni við? Nei, tey eru skapt til at ganga við, segði landsstýrismaðurin

Eisini Mary í Garði fegnaðist um hetta tiltakið, sum hon vónar og roknar við verður eitt afturvendandi tiltak.

- Vit hava Løkjakaféina her úti á Argjum, sum er fyri tey sinnisveiku. Tey skipa regluliga fyri ítróttarligum aktiviteti, sum til dømis at bowla ella ganga túrar. Og eg haldi eisini, at Fólkaheilsurenningin hevur verið við til at inspirera til hendan ítróttadagin, segði Mary í Garði.

Sjálvarkappingarnar byrjaðu um hálvgum tíggjutíðina og halda fram til áleið klokkan sekstan í dag. Greinirnar, ið kappast verður í, eru fótbóltur, boccia, rundbóltur og kúluvarp.